# og grønt hár

## Soleiðis gjørdu vit vistfrøðiliga hárið

Eg litaði mær hárið sjálv, tá ið vit vóru á G! í summar. So tað er púra oyðilagt og ringt at lita aftur. Eg og Hansa tosaðu eina løtu saman og vórðu samdar um, hvussu hárið skuldi gerast.









Fyrst litaði hon alt tað reyða umaftur, og tað ið var vaksið út.
Síðan avbleikti hon partar av hárinum og gav mær nakrar appilsingular og violettar strípur í, fyri at geva meira spæl í, og at undirstrika reyða litin.

Hansa klipti 'inn í' hárið, fyri at gera tað meira pjuskut og livandi, og at enda slættaði hon tað. Aftaná krúllaði hon tað við slættijarninum, og setti tað við voksi og øðrum.
18 ára gamla Jóhanna Dahl er lærlingur hjá Hansu. Hon hevur verið í læru í eitt ár. Hon slapp at smyrja mær, og eg haldi, at hon dugir ordiliga væl.



